Ferðlutrygdin hjá hvítanesbørnum endað á hægsta stað

Tórshavnar Býráð heitir nú á landsstýrið og løgtingið um at syrgja fyri, at hvítanesbørn fáa tryggan farveg til og frá skúla

ELI GUTTESEN

Stendur tað til borgarstjóran í Havn, Leivur Hansen, eiga skúlabørn á Hvítanesi at hava tryggan farveg í skúla.

Tí hevur hann nú vent sær bæði til landsstýrið og løgtingið fyri at fáa bæði játtandi og útinnandi myndugleikan í tal, so ferðsluviðurskiftini omanfyri Hvítanes kunnu fáast í eina tryggari legu.

Hóast vegurin fyri koyrandi ferðslu ongantíð hevur verið betri enn nú, so liggur bygdin fullkomiliga avbyrgd, tá tað kemur til tey, sum eru til gongu.

Serliga útsett eru skúlabørnini á Hvítanesi, sum dagliga skulu til og frá skúla. Tey flestu ganga í Hoyvíkar Skúla, sum umframt at liggja nakað burturi eisini liggur hinumegin Hvítanesvegin. Hvítanesvegurin er ein av mest trafikeraðu vegastrekkjum í Føroyum og fyri at koma í skúla noyðast børnini eftir tí partinum av Hvítanesvegnum, har hámarksferðin er 80 kilometrar um tíman.

Serliga stórur er vandin, tá børnini royna at finna sær løgir at sleppa yvirum vegin, tí børnini hava ikki neyðuga førleikan at meta um ferð og fjarstøðu á akførunum, tá ferðin er so høg.

Liva í ótta

Dag og dagliga liva foreldrini í ótta fyri, at okkurt skal henda smáu børnum teirra. Serliga er tað myndin at siggja børn í fyrsta flokki ganga undir liðini á 50 tons tungum trailarum, sum virkar ræðandi. Í dag er eingin skilnaður millum tey gangandi og koyrandi á hesum strekki.

Børn hugsa ofta meir um spæl enn um ferðslutrygd. Tí skal lítið til, áðrenn eitt av børnunum endar skeivu megin strikuna og verður klaskað upp móti grønini á einum akfari, sum strýkur framvið við 80 kilometra ferð.

Men hetta er tíverri tann ferðslutrygd, myndugleikarnir bjóða hvítanesbørnum í dag, hóast bæði landsstýrismenn og løgtingmenn nærum hvønn dag sjálvir koyra á hesum vegastrekki og tí áttu at sæð trupulleikan.

Landsuppgáva

Orsøkin til at borgarstjórin í Havn hevur vent sær til hægru myndugleikarnar fyri at fáa loyst spurningin er, at býráðið millum annað hevur fingið harðar ákoyringar frá einum foreldrabólki á Hvítanesi, sum arbeitt við málinum eina tíð.

Men borgarstjórin heldur fast um, at Hvítanesvegurin er landsvegur allur sum hann er, og tí eigur Landsverkfrøðingurin at loysa uppgávuna.

Men higartil hevur Landsverkfrøðingurin borið seg undan vegna tørvandi játtan á fíggjarlógini.

Tí vendir borgarstjórin í Havn sær nú beinleiðis til hægru myndugleikarnar.

Gomul semja

Í brævinum vísir borgarstjórin til eina semju millum kommununa og landstýrið frá 1987. Sambært hesi semjuni millum táverandi borgarstjóran í Havn, Poul Michelsen og táverandi landsstýrismann í samferðslumálum, Lasse Klein, átók landið sær allar neyðugar ábøtur á Hvítanesvegnum í sambandi við nýggja vegasambandið millum Havnina og Norðstreym.

Í brævinum til landstýri og løgting sigur borgarstjórin, at bert ein partur av tí, sum avtalað var í semjuni, er framt í verki.

Tí heitir hann á hægru myndugleikarnar um at útvega Landsverkfrøðinginum neyðugu játtanina til ongantíð ov skjótt at fáa Hvítanesvegin umbygdan, so hann er tryggur bæði hjá koyrandi og ikki minst gangandi at ferðast eftir.

Vónandi verður málið loyst, áðrenn vandamikla vegastrekkið hevur kravt mannalív.

Vandamikil farleið hjá skúlabørnum

Lið um lið við tunga ferðslu

Bussleiðin kærkomin

Offrað fyri effektiviteti

Børnini prísgivin

Fyrst buss so gøtu

Tá børnini á Hvítanesi koma aftur úr skúla, hava tey hvørki nakra gonguleið ...

Dimmalætting hevur fyrr víst á vandan hjá børnunum á Hvítanesi tá tey skulu til og frá skúla

Teknsiku Skúlin í Havn fekk í gjár framsýningarpallin í gávu frá Saga petroleum. Frá vinstu: Sven Roest, stýrislimur og Timmas Sørensen, formaður í stýrinum fyri Tekniska Skúlan, Egon Øregaard, settur skúlastjóri, Geir Atle Rishovd, leiðari, og Pauli Einarsson, varaleiðari á deildini hjá Saga í Føroyum

Mynd: Kalmar

Saga vil samstarva við teknisku skúlarnar

RANDI JACOBSEN

Leiðslan fyri Tekniska Skúla í Havn fekk í gjár handað ein framsýningarpall frá oljufelagnum Saga Petroleum.

Hetta er ein pallur, sum sýndur varð fram á framsýningini herfyri á Tvøroyri.

Pallurin er tveir metrar høgur.

Ætlanin er, at pallurin skal verða standandi á Tekniska Skúlanum, sum partur av eini fastari framsýning, ið spakuliga verður bygd upp.

Egon Øregaard, fyribils settur stjóri á Tekniska Skúlanum í Havn, heldur væl um samstarvið, sum skúlin nú hevur fingið við Saga Petroleum.

Saga hevur áhuga fyri teknisku útbúgvingunum, sum í teirra verð hava stóran týdning í oljuvinnuni, og skúlin er við at gera seg til reiðar at taka við avbjóðingini.

Samstarvið hevur eisini longur havt við sær, at Saga hevur játtað at sponsorera eina arkitektakapping, ið ætlanin er at skriva út í sambandi við, at nýggjur Tekniskur Skúli skal byggjast.

Karin fekk starvið

Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum hevur sett Karinu Hammer sum fyrstatalærara í Kollafjarðar skúla frá 1. august í ár.

Karin Hammer hevur læraraprógv frá Føroya Læraraskúla í 1979, og hon hevur starvast í Kollafjaðrar skúla síðan 1980. Trý tey fyrstu árini var hon vikarur, og síðan hevur hon verið lærari í føstum starvi.

Síðan Hanus Joensen í fjør fór frá sum fyrstilærari, tí hann fekk skúlastjórastarv, hevur Karin Hammer verið fyribilssett sum fyrtilærari í Kollafjarðar skúla.

Hon hevur í fjør lokið 1. part av serlæraraútbúgvingini.

Tvær umsóknir vóru til starvið sum fyrstilærari í Kollafjarðar skúla.

Nú hevur landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum tikið avgerðin, at Karin Hammer skal verða fyrstilærari í Kollafjarðar skúla

Fuglfirðingar »í útlegd«,

sum felagið »Karvatoftir« ikki hevur adressuna hjá, kunnu gerast limir og seta seg í samband við felagið, c/o Óla Hendrik av Fløtum, Landavegur 96, 100 Tórshavn, tlf. 312522, har teir fáa nærri upplýsingar um endamálið við at varðveita »Kyrjastein« sum sjósavn í Fuglafirði.

Veiðitjóvur í rættin

RANDI JACOBSEN

Seinnapartin í dag fer Føroya Rættur at viðgera málið um franska garnabátin Bruix, sum Tjaldrið tók fríggjadagin í seinastu viku norðanfyri Ytra Banka.

Bruix hevði hvørki fiskiloyvi og ei heldur loyvi at royna við garnum.

Skipið hevði tilsamans 86,5 tons av kostnaðarmiklum fiskasløgum í lastini. Veiða og reiðskapur vórðu mett til 1,2 mió. krónur. Sektaruppskotið var 100 000 krónur umframt at missa veiðu og reiðskap.

Seinni hevur skiparin prógvað, at 15 av tonsunum í lastini hevði báturin fiskað, áðrenn hann kom í føroyskan sjógv, og upphæddin 1,2 mió. krónur er tí lækkað niður í 1,1 mió. krónur. Kravið um 100 000 krónur í bót stendur við óbroytt.

Skiparin boðaði í gjár frá, at hann ikki tók við sektaruppskotinum, og tí verður málið lagt fyri rættin í dag.

Kvinnurnar hava orðið í Klaksvík

Flaggdagin verður í Klaksvík politiskur fundur, har kvinnuligu valevnini fáa orðið

Ein áhugabólkur í Húsmøðrafelagnum í Klaksvík hevur tikið stig til ein politiskan valfund, har kvinnuligu valevnini í Norðuroyggjum verða við.

Fundurin verður flaggdagin kl. 19 í Bøgøtu 3.

Allir átta flokkarnir, sum umboðaðir eru á tingi, stilla upp í Norðuroyggjum, og allir uttan Verkamannafylkingin og Sjálvsstýrisflokkurin hava stillað kvinnur upp eisini í Norðuroyggjum. Av tilsamans 44 valevnum eru 11 kvinnur, t.v.s. 25.

Talið av kvinnum, sum hvør flokkur hevur á lista sínum, er hetta:

Fólkaflokkurin 1 av 7, Sambandsflokkurin 1 av 4, Javnaðarflokkurin 3 av 7, Sjálvsstýrisflokkurin 0, Tjóðveldisflokkurin 2 av 7, Kristiligi Fólkaflokkurin 3 av 7, Miðflokkurin 1 av 3, og Verkamannafylkingin sum áður sagt 0 kvinnu.

Áhugabólkurin í Húsmøðrafelagnum helt tað vera rætt at hava ein slíkan fund, har kvinnurnar eiga pallin, tí tá bara fjórða hvørt valevni er kvinna, detta tær lættliga burtur ímillum á einum vanligum valfundi. Tær 11 uppstillaðu kvinnurnar í Norðuroyggjum eru: Rúna Sivertsen fyri Fólkaflokkin, Betta Joensen fyri Sambandsflokkin, Kristianna Høgnesen, Eyðgunn Samuelsen og Mamy Dahl Sørensen fyri Javnaðaflokkin, Jorun Høgnesen og Óluva Klettskarð fyri Tjóðveldisflokkin, Hilda Johannesen, Alma Petersen og Gvøðbjørg West fyri Kristiliga Fólkaflokkin og Emly K. Petersen fyri Miðflokkin.

Kvøldið verður skipað sum eitt alment politiskt hugnakvøld við framløgu, orðaskifti og drekkamunni. Øll eru vælkomin á fundin, sum verður í Bøgøtu 3 flaggdagin, leygardagin, kl. 19.

Skipið Zanzibar – søgan um skipbrot og lívskor sillinga

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út barnabókina »Skipið Zanzibar«, sum Michael Murpurgo hevur skrivað og Christian Birmingham hevur myndprýtt. Elin Mortensen hevur týtt bókina úr enskum

Sjálv søgan í bókini er dagbókin hjá 14 ára gomlu Lauru, skrivað í 1907. Laura andaðist 100 ára gomul, og tá komu øll skyldfólk hennara at fylgja. Hon læt eftir seg okkurt til øll, og Michael, sum hon var ommusystir hjá, fær dagbókina. Við tí inniliga tóna, ið eyðkennir dagbókafrásagnir, sigur Laura okkum frá o.u. einum ári hjá teimum, familjuni Perrymann, og hinum á Sillingum [Scillyoyggjum] við.

Scillyoyggjar eru í ein útsynning úr Landsend, syðsta partinum av Bretlandi. Í árinum 1907 stendur illa til á oyggjunum. Vetrarstormarnir fara illa við oynni, summarið er vánaligt og nógv húski gera av at flyta inn á megnlandið. Tvíburðarhróðir Lauru leiðist av at vera sum fangi á oynni. Hon fer til sjós. At enda er eisini pápi Lauru um at blaka frá sær, tá ið ein ódnarstormur gevur oynni óvæntaðan storm...

»Skipið Zanzibar« er spennandi og hugtakandi bók, sum fer fram í einum oyggjasamfelagi sum okkara. Støðan á Scillyoyggjum hevur ikki verið ólík støðuni í Føroyum um aldaskiftið 1900.

Eisini sigur søgan okkum frá upprunanum til tiltikna kapproðurin, sum nú er á hvørjum ári í Scillyoyggjum, í serligum bátaslagi, nevnt gigs. Føroyingar verða á fyrsta sinni umboðaðir í hesum kapprodrin um í summar við bátinum Brendan, sum oljusamtakið The Faroese Partnership hevur latið Róðrarsambandi Føroya. Oljusamtakið hevur eisini stuðlað bókini.

Bókin »Skipið Zanzibar« er øll sum hon er prýdd við vøkrum myndum, sum Christian Birmingham hevur teknað. Bókin er 122 síður. (Hon fer ikki í Barnabókaklubban.)

Dimmalætting hevur sett, prentað og umbrotið bókina. Helge Justinussen hevur heft.